Jacob Vestergaard á fund við kanadiska fiskimálaráð harran:

Umrøða stongsulin

- Tað er ógjørligt at siga, um nakað spyrst burtur úr á hesum fundinum ella ikki, sigur landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, sum kortini ásannar, at partarnir tosað betur saman nú, enn teir hava gjørt

STONGSUL
Vilmund Jacobsen

Í døgunum, 16.-18. juni, verður fundur í Halifax millum fiskimálaráðharrarnar í londunum, sum liggja í Norðuratlantshavi.

Hetta er ein árligur fundur, sum skiftir millum londini, og hesaferð eru tað so kanadiarar, sum eru vertir.



- Vit fara at bíða eftir, hvat spyrst burtur úr fundinum við kanadiska fiskimálaráðharran, áðrenn endalig støða verður tikin til, um føroysk rækjuskip sleppa aftur á Grand Bank, sigur Jacob Vestergaard

at høvuðsevnið á hesum fundi verður óvanliga støðan, sum er millum londini, har føroysk fiskiskip ikki sleppa inn í kanadiskar havnir.

Grand Bank

Stríðið botnar í trætuni um Grand Bank, har føroyingar kenna seg at vera fyri vanbýti, tí føroysk rækjuskip vóru millum tey fyrstu, sum byrjaðu at fiska rækjur á hesi leið. Tískil halda tey seg eisini hava nøkur rættindi fram um onnur lond, sum vóru nógv seinni á sjóvarfallinum.

Tað er NEAFC, sum umsitir rækjuveiðina í altjóða sjógvi á Grand Bank. Í hesi skipan fáa føroysk rækjuskip millum rækjuskip úr fleiri øðrum londum bert tillutað nøkur fá tons av rækjum.

Sambært søguligum tølum og við atliti til samlaðu kvotuna á hesi leið, meta føroyingar seg at hava rætt til at fiska 1344 tons av rækjum í altjóða sjógvi á Grand Bank.

- Hetta er tað tal, sum føroyskir myndugleikar í samráð við rækjuvinnuna halda seg hava søgulig rættindi til, men her eru NEAFC og kanadisku myndugleikarnir ikki samdir við okkum. Stríðið stendst eisini av, at kanadiumenn halda, at føroysk rækjuskip, sum tíðin leið, fiskaðu nógv meira á Grand Bank enn hesi 1344 tonsini.

Óvanlig støða

Jacob Vestergaard sigur, at tá ið føroysku rækjuskipini seinni fingu eygleiðarar umborð, sum høvdu eftirlit við, at veiðan á Grand Bank ikki fór yvir hesi 1344 tonsini, broyttist tónalagið hjá kanadisku myndugleikunum nakað, og síðan hava partarnir kunnað tosað saman um viðurskiftini.

- Vit vónaðu, at tað fór at uploysa stongsulin, tá ið vit settu eygleiðarar umborð, men tað hevur ikki víst seg. Samskiftið, sum verið hevur millum londini bæði, hevur mest verið á embætismannastigi, leggur hann aftrat.

Landsstýrismaðurin sigur seg duga illa at meta um, hvørt nøkur loysn fer at spyrjast burtur úr á fund-inum í Halifax, tí málið tykist kortini so fastlast.

- Men tað er í øllum førum ein sera óvanlig støða, at eitt land stongir sínar havnir so leingi fyri skipum úr einum øðrum landi, sigur hann.

Fyri og ímóti

Jacob Vestergaard vísir á, at enn hava føroyskir myndugleikar ikki alment boðað frá, at rækjuveiðan á Grand Bank verður tikin uppaftur, men tað liggur í kortunum, at landsstýrið ætlar at geva føroyskum rækjuskipum loyvi at fara innaftur á Grand Bank eftir 1. juli.

- Vit fara tó í fyrsta lagi at bíða eftir, hvat spyrst burtur úr fundinum við kanadiska fiskimálaráðharran, sigur hann.

Seinni í hesi vikuni fer landsstýrismaðurin eisini at hava fund við Felagið Rækjuskip um støðuna.

- Rækjumenn eru misjavnir á máli um týdningin av, at kanadisku havnirnar eru stongdar. Summir vilja hava, at vit halda okkum til NEAFC-ásettu kvotuna á Grand Bank, soleiðis at kanadiumenn vilja lata sínar havnir uppaftur. Aðrir halda, at tað hevur størri týdning fyri rækjuskipini, at tey sleppa innaftur á Grand Bank.

Jacob sigur, at hetta eru spurningar, sum hann fer at taka upp til viðgerðar við vinnuna fyri fundin í Halifax, tí hann heldur tað vera umráðandi, at vinnan er við í teimum avgerðum, sum tiknar verða um framtíðina.

Eingin tøkk

Nú rækjuflotin er í svárari kreppu, skilir landsstýrismaðurin væl, at skipini vilja sleppa innaftur á Grand Bank at fiska, tí prísurin fyri hesar rækjurnar er betur enn fyri rækjurnar á eitt nú Flemmish Kap.

- Hjá teimum, sum kenna søguna um føroysku rækjuvinnuna, er tað svárt at síggja, at NEAFC og kanadiumenn ikki vilja taka hædd fyri, at tað vóru føroyingar, sum vóru við til at byggja upp kanadisku rækjuvinnuna, sum í dag hevur veldugar veiðimøguleikar í egnum sjógvi, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður.

Stongdar havnir

Nú kanadisku myndugleikarnir hava havt sínar havnir stongdar fyri føroyskum fiskiskipum í langa tíð, tí londini eru ósamd um veiðirættindi føroyinga á Grand Bank, hevur Jacob Vestergaard, fiskimálaráðharri, biðið kanadiska fiskimálaráðharran um serstakan fund at umrøða støðuna, sum er millum londini.

Fundurin er ásettur at verða eftir almenna fundin millum norðuratlantisku fiskimálaráðharrarnar.

Jacob Vestergaard sigur,

Tøkk

Hjartans tøkk fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi okkara

Jacob Adrian Hansen
Leirvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar, til Essa fyri góðan sang, Regin, Petur Adrian, kokkarnar og berarar. Tøkk til tey, ið komu inn á gólvið, ella ringdu, og luttóku í stór sorg okkara. Tøkk fyri kransar og peningagávur til Missiónshúsið, og fyri hjálp á allan hátt. Vit vilja eisini fegin takka øllum, ið vóru um Jacob til tað seinasta. Ein serstøk tøkk til starvsfólkið á B5 og B7, heimarøktina og heimahjálpina.

Familjunnar vegna
Solveig, Edvard, Sanna, Fríðborg, Olaf og Anker

Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá elskaða mamma okkara

Julia Motzfeldt

doyði og varð jarðað.

Hjartans tøkk til Frelsunarherin, prest, sangarar og øll, sum hjálptu til við jarðarferðina og ervið.

Eisini ein seinkað tøkk til øll, ið hjálptu til, tá okkara elskaði pápi

Niels Edvin

doyði.

Hjartaliga tøkk øll somul.
Ongin nevndur ongin gloymdur.

Børnini

Tey hugna sær í Valhøll

Ung frá drama verkstaðnum í Havn spæla í hesari vikuni sjónleikin Valhøll í Sjónleikarhúsinum

SJÓNLEIKUR
Heri á Rógvi



Leikurin Valhøll er um kendu persónarnar og søgurnar úr Norrønu gudalæruni. Her verður Kvark floyngdur av Loka.
Mynd: Hjørdis Johansen.

20 børn úr Dramaverkstaðnum í Havn spæla hesa vikuna ein sjónleik í Sjónleikarhúsinum í Havn.

Leikurin við heitinum Valhøll er um tær vælkendu persónarnar í Norrønu gudalæruni. Tað er leiðari fyri Dramaverkstaðið, Hjørdis Johansen, sum sjálv hevur skrivað leikin.

Leikararnir eru millum 12 og 16 ára gamlir. Og teimum dámar at standa á palli og spæla sjónleik.

Onkur teirra hevur gingið á verkstaðnum í næstan seks ár, og onnur eru á fyrsta sinni á palli, eftir at hava gingið á Dramaverkstaðnum í vetur.

Hjørdis Johansen sigur, at áhugin er stórur millum børn og ung at spæla sjónleik.

– Eg havi verið noydd til at siga nei til nógv. Hesi, sum spæla í sjónleikarhúsinum, eru bert ein partur av teimum, ið ganga á verkstaðnum, sigur Hjørdis Johansen, sum hevur ein langan biðilista við fólki, sum vilja sleppa at spæla sjónleik.

Eisini eldri fólk ganga til undirvísing í Dramaverkstaðnum – frá átjan ára til hálvtrýss.

Vant verður vanliga einaferð um vikuna nakrar tímar. Roynt verður at framføra fyri fólki einaferð um árið, men hetta er ikki tað, sum hevur týdning, sigur Hjørdis.

Heldur leggja tey orku sína í at venja og mennast sum leikara og hava tað stuttligt saman. Vant verður í gamla Orgulverkstaðnum á Hálsi.

Leikurin verður spældur hvønn dag til og við hósdagin, grundlógardag.

Knústu bil í Øravík

Nakrir ungdómar knústu í farnu viku ein stolnan bil í Øravík. Teir vóru edrúuir, men tó bert 17 ára gamlir

STULDUR
Ingrid Bjarnastein

Suðuroy: Í farnu viku var ein bólkur á vitjan úr Danmark í Vági. Í bólkinum vóru ungdómar við atferðartrupulleikum, og teir fóru ikki heilt stillisliga um hurðarnar.

Tann eina dagin høvdu nakrir dreingir stolið ein bil, sum teir koyrdu avstað við, og knústu í Øravík. Teir vóru allir edrúuir, men tó bert 17 ára gamlir.

Í Vági høvdu teir eisini brotið gøtulyktir runt í bygdini, men teir vóru kendir, og sak verður skrivað um herverkini.

Av politistøðini á Tvøroyri upplýsa teir, at sakin verður viðgjørt, sum eitt vanligt mál, har krav verður um endurgjald. Síðani verður hon send fútanum, sum sendir alt niður til Danmarkar.

Annars verður upplýst úr Suðuroy, at vikuskiftið hevur verið ógvuliga friðarligt. Politiið sigur, at tað merkist væl, at ferðslan er nógv minni.

Ferðkanningar Yviri við Strond

FERÐKANNINGAR
Ingrid Bjarnastein

Havn: Fríggjadagin gjørdi politiið í Havn nakrar ferðkanningar Yviri við Strond í Havn. 12 bilar vórðu tiknir fyri at koyra ov skjótt. Tann eini koyrdi 95 km/t, sum er alt ov skjótt á bygdum øki.

Annars letur politiið væl at vikuskiftinum. Tað hevur verið friðarligt, og bert tveir hava verið í brumm-uni og gist.

Nøkur smærri herverk hava verið í miðbýnum, og onkrir bilar høvdu fingið snuddir.

Atlantic Petroleum

Ársaðalfundur

Við hesum verður innkallað til ársaðalfund í P/F Atlantic Petroleum at verða á Hotel Føroyum týsdagin tann 17. juni 2003 kl. 18.00 við fylgjandi fundarskrá:

1. Val av fundarstjóra
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi fyri 2002 til góðkenningar
3. Avgerð um nýtslu av yvirskoti ella rindan av halli sambært góðkenda roknskap og ársfrágreiðing
4. Val av nevnd. Tríggir nevndarlimir standa fyri vali.
5. Val av grannskoðara, ið stiur til næsti vanligi ársaðalfundur er lokin.
6. Ymiskt.

Tórshavn, tann 2. juni 2003

Nevndin

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

Aðalfundur í KT-felagnum

Boðað verður til aðalfund

mikudagin 18. juni 2003 kl. 09.30, á Hotel Hafnia.

Skrá sambært lógum felagsins.

Vinarliga boðað frá luttøku í Vinnuhúsinum.

KT-felagið
Vinnuhúsið
Postsmoga 1038, 110 Tórshavn
Tlf. 31 18 64, Fax 31 72 78, E-mail: industry@industry.fo

Sosialurin 341800

